## Teir gomlu duga enn

Gamla hittið hjá Blátt, Til Allar Vinir, er komið inn á hitlistan hjá Útvarpinum. Í síðstu viku var sangurin, sum kom út í 1989, eykalag á 15 teimum bestu, og sangurin kom inn sum nummar 11.

Sangurin hevur verið tráðspældur í føroyskum útvarpi, men hann er vorðin aktuellur aftur, nú hann er komin við á útgávuna Popplist 3. Tað hevur havt við sær møguleikan á 15 teimum bestu, og nýggja ættarliðið hevur tikið væl ímóti sanginum.

Umframt Blátt er bara eitt annað føroyskt umboð á 15 teimum bestu í løtuni. Tað er Knút Eysturstein, sum liggur nummar 5 við sanginum Í Hesi Nátt. Ein sangur av nýggju fløguni hjá kórinum Salt – tað er sangurin Ein Dag – er eykalag hesa vikuna.

15 tær bestu verða gjørdar upp út frá eini atkvøðugreiðslu, sum øll kunnu verða við í. Tað ber til at atkvøða fyri sangunum á 15 teimum bestu á heima-síðuni hjá Útvarpinum.

**ek**

## Ósáskúlin fær eitt sløð

Herfyri samtykti Klaksvíkar býráð, at útbyggingar av skúlanum við Ósánna skulu gerast fyri fleiri 10 milliónir. Men til býráðsfundin týskvøldið mælti fíggjarnevndin tó til at bíða við at umbyggja skúlan við Ósánna so longi sum hin skúlin á Ziskatrøð framvegis ikki er liðugt umvældur og umbygdur.

Hetta elvdi til nakað av ósemju á býráðsfundinum týskvøldið, men tað endaði kortini við, at ein millión verður sett av til skúlan við Ósánna komandi ár. Sostatt verða tað tilsamans 4,6 milliónir til skúlan við Ósánna at arbeiða við komandi ár.

**- sae -**

## Jólatræið í Klaksvík tendrast

Fríggjakvøldið 3. desember klokkan 19:00 verður jólatræið í Vágstúnið tendrað. Tað verður Markus úr Norðnástovu úr Mikladali, sum kemur at flyta fram røðu og at tendra træið.

Klaksvíkar Hornorkestur spælir jólaløg, og jólamenn koma á vitjan og bjóða børnunum góðgæti.

**- sae -**

# Nýggju kortini kunnu arga

**Nýggju chip-gjaldskortini kunnu koma upp á tvørs í útlandinum, tí øll eru ikki til reiðar at taka ímóti teimum. Í summum internet-handlum ber ikki longur til hjá føroyingum at gjalda við gjaldskortinum. PBS og VISA royna at loysa trupulleikarnar**

GJALDSKORT
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*Føroysku peningastovnarnir eru eisini farnir at brúka nýggju gjaldskortini við chip, og tey rigga væl. Øll lond eru tó ikki eins frammarliga, og í Onglandi kann tað koma fyri, at terminalar ikki vilja taka kortini. Eisini í nógvum internethandlum kunnu nýggju kortini ikki brúkast*

Føroyingar hava fingið nýggj gjaldskort við chip, sum við tíðini skal gera gjaldsháttin við kortum tryggari enn áður.

Men tryggari merkir ikki endiliga lættari, og føroyingar upplivað nú, at tað eru ikki øll, sum kunnu taka nýggju kortini.

Tað er uttanlands og á interneti, at trupulleikar nú kunnu stinga seg upp, og nógv av tí hevur samband við Ongland.

– Barnasjúkur raka ofta tey, sum ganga undan, og í hesum føri er tað PBS, tí so nógv gjaldskort eru skift út eftir stuttari tíð, sigur PBS, sum umsitir gjaldskortini í Danmark og í Føroyum.

### Kortini skulu verða tryggari

Nógva staðni kring heimin verður í hesum døgum skift frá teimum gomlu gjaldskortunum til nýggj chipkort.

Tað er trupult at margfalda upplýsingar, sum liggja krypteraðar á einum chippi, og chippið skal gera gjaldaskortið bæði tryggari og meira fjølbroytt at nýta. Men nýggju kortini, sum donsku og føroysku peningastovnarnir lata sínum viðskiftafólkum, hava bæði chip og magnetstrípu, og tað skal tulkast sum ein roynd at innføra chip-kort, men har tað eisini er gjørligt at brúka gomlu magnetstrípuna. Harvið er framstigið ikki so stórt, sum tað hevði verið, um magnetstrípan varð tikin burtur, men talan er um eina yvirgongd til chip-kort, og í løtuni verður magnetstrípan brúkt sum ein eyka trygd, tí nógvastaðni kann chip als ikki brúkast enn.

### Tekur tíð at tillaga

Flestu londini í Europa eru í holt við at skifta til nýggju kortini, men júst hendan tíðin, tá ið skift verður, kann skapa órógv, og sambært PBS kunnu tey, sum brúka kortini, koma út fyri trupulleikum í eina tíð.

Ein orsøk til hetta er, at nýggju donsku gjaldskortini kunnu brúkast í átta ár, og tað vilja ikki allir terminalar góðtaka.

Serliga í Onglandi er tað komið fyri, at terminalar ikki vilja taka kortið, tí har ganga gjaldskortini ikki yvir longri tíð enn 5 ár. Tað sama er við nógvum internethandlum, har skipaninar ikki eru gjørdar til handfara kort, sum kunnu brúkast í upp til átta ár.

– Vit kenna dømi um, at terminalar í útlondum og internethandlar ikki vilja taka nýggja kortið, og tað er serliga í Onglandi, at hetta kann koma fyri. Men VISA International kannar hetta og skal loysa trupulleikan, tí nýggju kortini lúka allar treytir hjá VISA, sigur PBS.

PBS heitir á fólk um at siga teimum frá, tá tey hava havt trupulleikar við nýggja kortinum, men hevur eisini onkur góð ráð at geva.

– Fert tú uttanlands við einum Visa/Dankorti, er tað eitt gott hugskot eisini at hava aðrar møguleikar at gjalda – antin við reiðum peningi ella við øðrum gjaldskorti. Tað kann koma fyri, at tú missir gjaldskortið ella ikki kanst brúka tað, sigur PBS.

### Føroyingar líta á PBS

Gjaldskortini hjá føroysku peningastovnunum koma øll frá PBS, sum mennir og umsitir hesi kort, og føroysku bankarnir hava fult álit á, at PBS røkir sína uppgávu til fulnar.

– Vit hava ikki upplivað nakrar serligar trupulleikar við nýggja gjaldskortinum, men eg eri fullvísir í, at eru onkrir smærri trupulleikar at byrja við, so loysir PBS teir, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

– Vit fáa einki gjørt við gjaldskortini, tí hetta eru kort hjá PBS, sum vit hava fingið loyvi at brúka. Tað er harmiligt, um tað eru onkrir smærri trupulleikar við nýggja gjaldskortunum, men soleiðis kann tað verða, tá ið nakað nýtt verður tikið í brúk. Eftir tí, sum vit kenna til, so riggar nýggja gjaldskortið væl, sigur hann.



*Lena Andersen fær nú eina hjálpandi hond frá einum kendum bretskum umboðsmanni*

# McCartney-umboð arbeiðir fyri Lenu

**Fyrrverandi umboðsmaður hjá Paul McCartney arbeiðir við at føra Lenu Andersen fram í útlandinum**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Hann hevur verið stjóri fyri plátufelagið Polydor UK, hann hevur havt leiðandi starv hjá Sony Europe, og hann hevur verið persónligur umboðsmaður hjá Paul McCartney í sjey ár. Nú hevur Rochard Ogden sítt egna umboðsfelag, og eitt av teimum fáu nøvnunum, sum hann hevur tikið til sín, er føroyska Lena Andersen.

– Eg arbeiði ikki við nøkrum ávísum stíli ella slagi av tónleiki. Mær dámar góðan tónleik, og eg eri fegin um at arbeiða við tónleikarum, sum eru góðir, áhugaverdir og kunnu koma langt, sigur Richard Ogden við heimasíðuna Hitquarters.

### Rósur til Lenu

Hann plagdi at hava nógv jørn í eldinum, men hann hevur nú repa seglini eitt sindur og arbeiðir heldur við nøkrum fáum nøvnum í sínum egna felag.

– Í løtuni arbeiði eg við Bomfunk MC´s, vit hava ein nýggjan punkbólk, sum kallast TAT, og vit arbeiða eisini við einum fantastiskum singer-songwriter úr Føroyum, sum eitur Lena. Hon ger tónleik saman við manninum hjá sær Niclas Johannesen, sigur Richard Ogden við Hitquarters.

Hann hevur verið umboðsmaður hjá Bomfunk MC's í nógv ár. Hann var við, tá bólkurin fekk gjøgnumbrot, og hann stýrir teimum framvegis.

Størsta uppgávan hjá Richard Ogden var frá 1987 og sjey ár fram, tá ið hann var umboðsmaður hjá Paul og Lindu McCartney.

Nú brúkar hann síni sambond og sína vitan til at føra Lenu Andersen fram uttanlands.